# Sáttmáli

millum

# Føroya- Skipara og Navigatørfelag
# og Fíggjarmálaráðið


Sáttmáli, SSL.......... 3
§ 1. Starvssetan og uppsøgn.......... 3
§ 2. Avloysarar og fyribilsstørv.......... 3
§ 3. Flokkan skipanna.......... 3
§ 4. Lønir og flokking av størvum.......... 3
§ 5. Tímaløn.......... 4
§ 6. Lønir (sí fylgiskjal 1).......... 4
§ 7. Vaktargjøld.......... 4
§ 8. Eftirlønartrygging.......... 4
§ 9. Lønar- og tænastualdur.......... 5
§ 10. Fyribils tænasta í hægri starvi.......... 5
§ 11. Samsýning fyri undirvísing.......... 5
§ 12. Arbeiðstíð.......... 6
§ 13. Arbeiðsætlan.......... 6
§ 14. Meirarbeiði og avspáking.......... 7
§ 15. Meirarbeiðsviðbót.......... 7
§ 16. Kostpeningur.......... 7
§ 17. Arbeiðsútbúnaður.......... 7
§ 18. Sjúka, frítíðarløn, eftirsitiløn og barnsferð.......... 7
§ 19. Tænastufrí.......... 8
§ 20. Tænastuferðir.......... 8
§ 21. Skeiðvirksemi.......... 8
§ 22. Álitisfólk og nevndarlimir.......... 9
§ 23. Fylgisbólkur.......... 9
§ 24. Samstarvsráð.......... 9
§ 25. Samráðingar og seming.......... 10
§ 26. Tulking av sáttmálanum.......... 10
§ 27. Gildi sáttmálans.......... 10
Nýtt protokollat:.......... 10

SÁTTMÁLI, Magnus Heinason.......... 12
§ 1 Starvssetan og uppsøgn.......... 13
§ 2 Hýra.......... 13
§ 3 Mynstring.......... 13
§ 4 Úrtíð o.a.......... 13
§ 5 Skipanartreytir.......... 13
§ 6 Eftirløn.......... 14
§ 7 Lønar- og tænastualdur.......... 14
§ 8 Fyribils tænasta í hægri starvi.......... 15
§ 9 Fyribilshjálp v.m.......... 15
§ 10 Sjúka, frítíðarløn og eftirsitiløn.......... 15
§ 11 Barnsferð.......... 15

§ 12 Kostpeningur ........ 16
§ 13 Samráðingar og seming ........ 16
§ 14 Farloyvi ........ 16
§ 15 Skeiðvirksemi ........ 16
§ 16 Tænastuferðir ........ 16
§ 17 Arbeiðsklæði ........ 17
§ 18 Tulking av sáttmálanum ........ 17
§ 19 Trygdargrunnur ........ 17
§ 20 Førleikamenning ........ 17
§ 21 Eldrapolitikkur ........ 17
§ 22 Gildi sáttmálans ........ 18
Protokollat ........ 19
Protokollat ........ 20
Avtala ........ 21
Protokollat ........ 22
Lønartalva tann 1. oktober í 2008 ........ 23
Lønartalva tann 1. oktober í 2009 ........ 24

**Sáttmáli**

millum

**Føroya- Skipara og Navigatørfelag**
**og Fíggjarmálaráðið**

**Millum Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Fíggjarmálaráðið er gjørdur hesin sáttmáli fyri skiparar/stýrimenn á Strandfaraskipum Landsins.**

## § 1. Starvssetan og uppsøgn

*Stk. 1.* Tá ið starv er leyst, verður hetta lýst í minst einum føroyskum blaði. Lýsast skal, hvat starvið umfatar og hvørjum lønarflokki, starvið verður lønt eftir. Hetta er eisini galdandi, tá ið lýst verður eftir frítíðaravloysarum.

*Stk 2.* Uppsagnarfreistin frá arbeiðsgevara er 1 mánaður til tann seinasta í einum mánaði í fyrstu 6 mánaða starvstíð. 3. mánaða uppsøgn til seinast í einum mánaða eftir 6 mánaða starvstíð.
Uppsagnarfreistin verður longd við 1. mánaða fyri hvørt 3. starvsárið, tó longst í 6 mánaðir.

*Stk 3.* Uppsøgn frá skipara/stýrimanni skal gevast við 1. mánaða freist til seinast í einum mánaða.

*Stk 4.* Annars er Starvsmannalógin altíð galdandi.

## § 2. Avloysarar og fyribilsstørv

*Stk. 1.* Sum avloysari er at skilja sjófólk, sum arbeiðir fyri annað navngivið sjófólk, sum vegna sjúku, barnsburð ella farloyvi ikki er í starvi. Er ikki tilskilað í setanarbrævi í sambandi við avloysing, hvønn viðkomandi avloysir, og at viðkomandi verður settur í ásetta avmarkaða tíð, er starvið at meta sum vanligt starv við vanligari uppsagnarfreist frá fyrsta starvsdegi.

*Stk. 2.* Uttan mun til ásetingarnar í stk. 1, so kann SL hava fastar avloysarar og fyribilsstørv í ásetta avmarkaða tíð, uttan at hesir arbeiða fyri annað navngivið fólk, um setanar- og arbeiðstreytirnar eru nóg væl lýstar.

*Stk. 3.* Fyribilshjálp og avloysarar verða løntir eftir reglunum í grein 12 í sáttmálanum.

*Stk. 4.* Fyribilshjálp og avloysarar fáa eisini lønar- og tænastualdurskort samb. § 9 stk. 4 í sáttmálanum.

## § 3. Flokkan skipanna

*Stk. 1* Stødd skipanna verður lutað uppeftir bruttotonnagu, og verða tey flokkað soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| Bólkur | I: | Smyril |
| Bólkur | II: | Ternan og Teistin |
| Bólkur | III: | Sam, Ritan, Másin, Sildberin og Súlan |

*Stk. 2* Tá nýggj skip koma undir Strandferðsluna, skal samráðing vera millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag um bólking av teimum.

## § 4. Lønir og flokking av størvum

Skiparar og stýrimenn verða løntir eftir hjáløgdu lønartalvu soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| Skipari í bólki I | verður løntur í lønarflokki | 8 |
| Yvirstýrimaður í bólki I | verður løntur í lønarflokki | 7 |
| 1. stýrimaður í bólki I | verður løntur í lønarflokki | 5 |
| Skipari í bólki II | verður løntur í lønarflokki | 6 |
| Yvirstýrimaður í bólki II | verður løntur í lønarflokki | 4 |
| 1. stýrimaður í bólki II | verður løntur í lønarflokki | 2 |
| Skipari í bólki III | verður løntur í lønarflokki | 3 |
| Yvirstýrimaður í bólki III | verður løntur í lønarflokki | 1 |

*Viðmerking*
Skiparin á Sildberanum endar á stigi 03 í lønarflokki 03.
Yvirstýrimaðurin á Sildberanum endar á stigi 07 í lønarflokki 01.

## § 5. Tímaløn

Tímalønin verður roknað soleiðis:

- ársløn á viðkomandi stigi / 2548.

## § 6. Lønir (sí fylgiskjal 1)

*Stk. 1.* Lønartalvan (fylgiskjal 1) hevur gildi frá 1. apríl 2008.

*Stk. 2.* Frá 1. oktober 2008 hækkar lønin 2,15 %.
Frá 1. oktober 2009 hækkar lønin 2,15 %.

Annars er galdandi tann regla, at eingin, sum nú er í starvi, kann fara niður í løn.

*Stk.3.* Mánaðarlønin skal vera goldin í seinasta lagi síðsta gerandisdagin í mánaðinum

## § 7. Vaktargjøld

Fyri tilkallivakt yrkadagar verður latið vaktargjald 1. Fyri tilkallivakt sunnu- og halgidagar verður latið vaktargjald 2.

*Stk. 2* Hevur skipari/stýrimaður tilkallivakt fastan frídag, tá skipið liggur, fær viðkomandi vaktargjald fyri alt døgnið.

*Stk. 3* Gjald fyri tilkallivakt verður ikki veitt saman við úrtíðargjaldi.

## § 8. Eftirlønartrygging

Strandfaraskip Landsins rindar vegna skiparar og stýrimenn, til eina eftirlønarskipan, ið Fíggjarmálaráðið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag kunnu góðkenna, í eftirlønargjaldi:

frá 1. oktober 2008 verður goldið 6 %.
frá 1. oktober 2009 verður goldið 7 %.

av tí til eina og hvørja tíð galdandi mánaðarløn eftir lønarskalanum, men ikki av serstøkum gjøldum ella úrtíðargjøldum.

*Stk. 2* Fyri skiparar/stýrimenn, sum onkursvegna ikki kann verða við í eftirlønartryggingarskipan, tí t.d. heilsan bilar, skal eftirlønargjaldið verða goldið í eina uppsparingarskipan, sum sáttmálapartarnir semjast um.
*Stk. 3* Skipari/stýrimaður kann gera avtalu við arbeiðsgevaran um at rinda meir í eftirlønargjaldið. Lønin verður so lækkað samsvarandi

*Stk. 4* Skipari/stýrimaður, sum hevur hálvt starv ella meiri, fær eftirlønargjald.

*Stk. 5* Alt eftirlønargjaldið verður flutt samstundis, sum lønin verður útgoldin.

## § 9. Lønar- og tænastualdur

*Stk. 1* Skipari/stýrimaður eru 1 ár á hvørjum stigi.

*Stk. 2.* Lønaraldurin er vanliga tað áramál, sum sjófólk hevur arbeitt innan viðkomandi øki.

*Stk. 3.* Tá Skipari/stýrimaður verða sett í starv hjá Strandfaraskipum Landsins ella fara úr starvi, skulu tey fáa váttan um lønar- og tænastualdur. Sama er galdandi fyri avloysarar.

*Stk. 4.* Hava fólk vunnið sær lønar- og tænastualdur innan Strandfaraskip Landsins, skulu tey verða innplaserað eftir hesum. Avgerð um innplasering verður at taka aftan á samráðing millum Strandfaraskip Landsins og Føroya Skipara- og Navigatørfelag.

*Stk. 5.* Tá ið viðurskiftini tala fyri tí, kunnu partarnir gera avtalu um starvsaldur eftir øðrum reglum.

*Stk. 6.* Verður skipari/stýrimaður í landsins tænastu fluttur í hægri starv umborð á skipum landsins, kemur hann á tað stig í nýggja lønarflokkinum, sum liggur næst omanfyri ta løn, hann hevði frammanundan, og fær næstu aldursviðbót frá sama mundi sum frammanundan uttan so, at framflutningurin viðførdi, at lønarhækkingin svaraði til meira enn eitt lønarstig. Tá so er, fær hann nýggja aldursviðbót eitt ár aftan á framflutningin.

*Stk. 7.* Strandfaraskip Landsins kann, har umstøður tala fyri tí, loyva, at annar starvsaldur telur við, um talan er um tænastu í líkastillaðum ella hægri starvi sum skipari ella stýrimaður. SL skal í tílíkum førum senda Føroya Skipara- og Navigatørfelag málið til ummælis.

*Stk. 8.* Verður skipari/stýrimaður settur í starv í lægri bólki enn í starvinum frammanundan, verður lønaraldurin í fyrra starvinum taldur við.

*Stk. 9.* Skiparar og stýrimenn við skipum Strandferðslunnar skulu mynstra sambært ta til eina og hvørja tíð galdandi løgtingslóg um manning av skipum.

## § 10. Fyribils tænasta í hægri starvi.

Skipari/stýrimaður, sum eftir serligum boðum ella eftir frammanundan fastløgdum arbeiðslag fyribils røkja hægri størv í minst eina vakt, eiga í hesum tíðarskeiði at verða løntir við somu løn, sum teir høvdu fingið, um teir vóru settir í starvið, treytað av, at teir yvirtaka tær arbeiðsuppgávur, ið standast av hægra starvinum.

## § 11. Samsýning fyri undirvísing

Skiparar/stýrimenn hava rætt til serligt gjald fyri undirvísing og fyrireiking til undirvísing eftir hesum reglum.

1. Tá ið undirvísing og fyrireiking eru í vanligari arbeiðstíð, verður eingin samsýning givin.
2. Er undirvísingin uttan fyri arbeiðstíðina, fæst gjald fyri tímar, frálæran er.
3. Tá ið undirvísingin er í arbeiðstíðini, men fyrireikingin uttanfyri arbeiðstíðina, fæst ½ gjald fyri teir tímar, undirvíst verður.

*Samsýning*

Tímaløn kr. 225,00

## § 12. Arbeiðstíð

Arbeiðstíðin verður løgd soleiðis, at arbeiðstíðin í 2 mánaðir ikki er omanfyri 2x212,3 tímar (212,3 = 49 x 52/12), og arbeiðstíðin í ein mánað ikki er omanfyri 250 tímar. Arbeiðstíðin verður gjørd upp fyri hvørjar tveir mánaðir. Í staðbundnari avtalu, gjørd millum reiðarí og felagið, kann verða vikið frá ásetingunum um, hvussu langt tíðarskeið, arbeiðstíðin verður gjørd upp fyri.

*Stk. 2.* Fyri avloysara verður arbeiðstíðin gjørd upp fyri hvønn mánaða, tó kann arbeiðstíðin í ein mánaða ikki vera omanfyri 300 tímar.

*Stk. 3.* Staðbundin avtala kann eisini verða gjørd millum reiðarí og felagið um, at arbeiðstíðin á einum skipi ella á einari farleið verður broytt. Mánaðarlønin verður tá broytt 1/212,3 fyri hvønn tíma. Báðir partar kunnu uppsiga avtaluna við 3 mánað freist, til ein fyrsta í mánaðinum.

> *Dømi. Verður arbeiðstíðin broytt til 42 tímar um vikuna, er arbeiðstíðin um mánaðin 182 tímar (42*52/12).*
>
> *Arbeiðstíðin verður 30,3 tímar færri tímar um mánaðin (212,3-182) og mánaðarlønin verður lækkað 30,3/212,3.*

*Stk. 4.* Skipari/stýrimaður skal hava í minsta lagi 16 frídagar hvørjar 2 mánaðir.

*Stk. 5.* Einstakur frídagur skal í minsta lagi vera 36 tímar. Er talan um fleiri fylgjandi frídagar, verða teir roknaðir sum 24 tímar hvør.

*Stk. 6.* Fyriskrivaðar mattíðir verða, har vaktarskipan er, ikki roknaðar sum arbeiðstíð, tó í mesta lagi 1 tíma hvørja ferð og hægst 2 máltíðir um dagin.
*Stk. 7.* Arbeiðstíðin má bara slítast eina ferð um dagin og skal slitið vera minst 2 tímar samanhangandi, áðrenn tað kann dragast frá arbeiðstíðini.

*Stk. 8.* Fer skip í dokk, verður skipari/stýrimaður umborð, tá ið reiðaríið áleggur teimum tað, og ein vaktarætlan verður løgd, jb. stk 1. Vikið kann verða frá ásettu reglunum í staðbundnari avtalu millum reiðarí og álitisfólk.

## § 13. Arbeiðsætlan

Arbeiðsætlan verður gjørd fyri hvørt skipið sær, eftir galdandi ferðaætlan.

*Stk. 2.* Broytingar í arbeiðsætlanini eiga bara at verða gjørdar undir serligum umstøðum.

*Stk 3.* Verður skipari/stýrimaður boðsendur til arbeiðis á frídegi, við styttri fráboðanartíð enn 72 tímum, verða arbeiddu tímarnir samsýntir sum meirtímar.

*Stk. 4.* Arbeiðsætlanin verður send skipara/stýrimanni til viðmerkingar.

## § 14. Meirarbeiði og avspáking

Er talan um fleiri tímar enn ásett í § 12, stk. 1, verður teir samsýntir sum meirarbeiði. Tímalønin fyri meirarbeiði verður roknað soleiðis:

- ársløn á viðkomandi stigi / 2080.

Meirarbeiðsgjald verður latið fyri hvønn byrjaðan hálvan tíma.
Verða meirarbeiðstímar avspákaðir, verður hvør meirarbeiðstími roknaður sum 1,225 tími.

*Stk. 2.* Verða meirarbeiðstímar avspákaðir, skal føst avtala verða gjørd um, nær teir verða avspákaðir. Meirtímar, sum eru ikki lagdir inn í næsta vaktarskeið ella sum føst avspákanaravtala ikki er gjørd um, verða útgoldnir.

*Stk. 3.* Verður tilrættisløgd avspákan tikin aftur, skal hetta verða fráboðað í seinasta lagi 96 tímar, áðrenn farið verður undir avspákanina.
*Stk. 4.* Samsýning fyri at arbeiða sunnudagar, halgidagar og fastar frídagar er roknað við í føstu lønini.

*Stk. 5.* Skiparar í bólki 1 fáa ikki útgoldið meirtímar, tí teir eru viðroknaðir í føstu lønini.

## § 15. Meirarbeiðsviðbót

Skipari/stýrimaður sum hevur nógv álagt meirarbeiði, kann fáa meirarbeiðsviðbót. Viðbótin verður givin fyri 35 meirarbeiðstímar um ársfjórðingin. Fyri drúgt álagt meirarbeiði, sum er meiri enn 35 tímar um ársfjórðingin, verður samsýnt eftir ásetingunum í § 14.

*Stk. 2.* Tímarnir verða brúktir, tá ið okkurt stingur seg upp í mynstringartíðini og sum hevur við sær longri arbeiðsdag, enn ásett í arbeiðsætlanini.

*Stk. 3.* Staðbundin avtala kann verða gjørd millum reiðarí og felagið um at broyta tímatalið í stk. 1. Tá verður viðbótin broytt samsvarandi.

## § 16. Kostpeningur

Skiparar / stýrimenn eiga, tá ið teir sigla, rætt til frían kost umborð. Eisini eiga teir frítt uppihald, kunnu teir ikki búgva umborð, tá ið skipið er heimanífrá, og tá ið ikki ber til hjá teimum at búgva heima, meðan arbeitt verður umborð. Kann ikki matskaffast umborð, verður veitt endurgjald á kr. 100,00 um dagin. Ber ikki til at sova umborð, skal Strandferðslan gjalda kost- og uppihaldspening.

## § 17. Arbeiðsútbúnaður

Skiparar/stýrimenn eiga rætt til fríar eyðkennisbúnar eftir reglum, sum Strandfaraskip Landsins ásetir.

## § 18. Sjúka, frítíðarløn, eftirsitiløn og barnsferð

Viðvíkjandi sjúku, frítíð og eftirsitiløn galda reglurnar í Starvsmannalógini og frítíðarlógini, tó soleiðis, at eftirsitiløn verður veitt í mun til uppsagnartíðina hjá viðkomandi, minst 3 mánaðir og í mesta lagi 6 mánaðir. Skiparar/stýrimenn ið halda frítíð við løn, fáa í serligum frítíðargjaldi 1½ % av lønini í álmanakkaárinum frammanundan og 12% av úrtíðarlønini.

*Stk. 2.* Skipari/stýrimaður kann fáa frí við løn, tá barn/børn hansara eru sjúk, tó hægst 2 dagar hvørja ferð og í mesta lagi 10 dagar árliga. Hava teir meira enn 2 børn undir 10 ár, kunnu teir fáa 20 dagar.

*Stk. 3.* Starvsfólk, ið verður pápi, kann eftir umsókn fáa frí í ein mánað við ongari løn. Soleiðis er eisini, ættleiðir hann barn.

*Stk. 4.* Skipari/stýrimaður, ið er við barn, eigur at siga stovninum frá í minsta lagi 3 mánaðir, áðrenn hon væntar at eiga.

*Stk. 5.* Skipari/stýrimaður verður veitt full løn fyri tíðina, frá tí hon verður óarbeiðsfør, tó í minsta lagi 8 vikur áðrenn hon væntar sær at eiga og tilsamans 24 vikur. Afturat hesum kann hon fáa frí við ongari løn í 6 vikur.
Harafturat kann hon eftir umsókn fáa frí við ongum missi í starvsaldri í 5 mánaðir.

*Stk. 6.* Umframt nevndu sømdir í stk. 5, kann starvsfólk fáa upp í 6 mánað sjúkrafrí, tá ið hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur og/ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum. Í slíkum umstøðum verður veitt henni full løn. Í serligum umstøðum kann setanarmyndugleikin gera av at veita meiri enn 6 mánað sjúkraløn.

*Stk. 7.* Ættleiðir skipari/stýrimaður barn, fær viðkomandi eftir umsókn tænastufrí upp í 24 vikur við løn.

## § 19. Tænastufrí

Skipari/stýrimaður kann verða givin tænastufrí uttan løn, har tað ikki stríðir ímóti stovnsins áhugamálum. Tænastufrí kann verða givin í upp til 2 ár hvørja ferð, tó í mesta lagi 4 ár út í eitt, og hevur viðkomandi stovnur skyldu til at hava starv til viðkomandi, tá tænastufrítíðin er endað.
*Stk. 2.* Um so er, at skipari/stýrimaður fær farloyvi í samband við útbúgving, ið tænir áhugamálum stovnsins, skulu partarnir kunna koma ásamt um farloyvi við løn ella við niðursettari løn.

*Stk. 3.* Um skipari/stýrimaður ikki ætlar at koma aftur í starv hjá Strandfaraskipum Landsins skal viðkomandi boða frá skjótast til ber, seinast 1 mánað frammanundan, at tænastufrítíðin er úti.

## § 20. Tænastuferðir

Dag- og tímapeningur undir tænastuferð og endurgjald fyri nýtslu av egnum bili í tænastuørindum verða sum fyri tænastumenn landsins ella eftir serligari avtalu

## § 21. Skeiðvirksemi

Tá skeiðvirksemi fer fram eftir ynski stovnsins, skal avvarðandi stovnur útvega luttakaranum prógv fyri tað, skeiðið hevur umfatað. Fyri luttakarar, sum búgva í øðrum kommunum enn henni, skeiðvirksemi er lagt og í minsta lagi 4 km. frá skeiðstaðnum, eru reglurnar í § 20 galdandi.

*Stk. 2* Skiparar/stýrimenn hava skyldu at fara á tey skeið, sum arbeiðsgevarin fyriskipar. Tá ið skeiðvirksemi fer fram í frítíðini verður samsýnt við vanligari dagløn, ið svarar til 7 tímar pr. dag. Er neyðugt hjá skiparum/stýrimonnum at fara heiman í frá dagin fyri skeiðið byrjar, verður ferðatíðin samsýnt við brúktum tímum, tó í mesta lagi 7 tímum pr. dag.

*Stk. 3.* Tá ið skeiðvirksemi fer fram í arbeiðstíðini verður tað tímatalið rindað, ið viðkomandi vanliga vildi verið í tænastu.

*Stk. 4.* Fara skiparar/stýrimenn sjálvir á slík skeið í fríviku, verður tað ikki roknað sum arbeiðstíð. Tó kann avtala verða gjørd í hvørjum einstøkum føri, um arbeiðsgevarin skal gjalda skeiðkostnaðin

## § 22. Álitisfólk og nevndarlimir

Tá tað á einum skipi starvast í minsta lagi 3 limir í Føroya Skipara- og Navigatørgfelag, hava hesir limir rætt til at velja sær eitt álitisfólk, sum ikki kann verða uppsagt, uttan uppsøgnin hevur verið til viðgerðar millum Føroya Landsstýri og Føroya Skipara- og Navigatørgfelag.

*Stk. 2.* Til álitisfólk kann bert veljast tann, ið hevur fulltíðarstarv og hevur verið umborð á viðkomandi skipi í minsta lagi 1 ár, uttan so at tað av serligum umstøðum gerst neyðugt at víkja frá hesum.

*Stk. 3.* Valið hevur ikki gildi, fyrrenn tað er góðkent av Føroya Skipara- og Navigatørgfelag og boðað leiðsluni á avvarðandi stovni. Hendan fráboðan eigur at verða gjørd í seinasta lagi 14 dagar eftir valið.

*Stk. 4.* Álitisfólkið hevur skyldu at ansa eftir, at lógir, sáttmálar, fyriskipanir, mattíðir v.m., ið eru galdandi fyri arbeiðsplássið sum heild, verða yvirhildin, og skal virka fyri best møguligum samarbeiði limanna og leiðslunnar millum.

*Stk. 5.* Álitisfólkið hevur rætt og skyldu til at tingast við deildar- og stovnsleiðslum um øll tílík mál, sum av felagnum eru løgd til tess. Er álitisfólkið ikki nøgt við avgerð leiðslunnar, skal tað leggja málið fyri felagið.

*Stk. 6.* Tá talan er um setan av starvsfólki, framflutning, flyting ella uppsøgn, skal leiðslan samráðast við álitisfólkið á avvarðandi skipi. Verða partarnir ikki samdir, skal álitisfólkið leggja málið fyri felagið.

*Stk. 7.* Álitisfólkið skal – í samráð við stovnin – í arbeiðstíðini hava møguleika fyri at taka sær av málum, ið viðvíkja starvsfeløgunum ella arbeiðsviðurskiftum á staðnum, tó soleiðis, at tað stendst so lítið tarn av hesum sum møguligt.

*Stk. 8.* Um skiparar/stýrimenn eru valdir í nevnd felagsins, skal teimum verða givin heimild at fremja felagsarbeiði í vanligu arbeiðstíðini í givnum førum, t.d. undir sáttmálasliti, sáttmálasamráðingum og arbeiðsósemju. Felagið ella Fíggjarmálaráðið gera stovninum vart við hesi viðurskifti í hvørjum einstøkum føri.

*Stk. 9.* Tá álitisfólk søkja um at sleppa á álitisfólkaskeið, fer Landsstýrið at viðgera slíkar umsóknir við vælvild. Sama er galdandi fyri nevndarlimir í felagnum.

## § 23. Fylgisbólkur

Í sáttmálaskeiðnum situr fylgibólkur, við tveimum umboðum fyri hvønn partin. Uppgávan hjá bólkinum er at eftirmeta fastlønarskipanina og viðgera teir trupulleikar, sum kunnu vísa seg at verða við at flyta yvir í nýggju fastlønarskipanina. Víst verður til § 6, stk. 2.

## § 24. Samstarvsráð

Á øllum almennum stovnum verður sett á stovn eitt samstarvsráð, har umboð fyri leiðslu, álitisfólk og varaálitisfólk sita. Samstarvsráðið skal hava innlit í øll mál stovninum viðvíkjandi, og verða avgerðir ikki tiknar, fyrr enn samstarvsráðið hevur gjørt sítt tilmæli.
Settur verður 4 manna bólkur við 2 umboðum valdum av yrkisfeløgunum og 2 valdum av Landsstýrinum at gera uppskot til reglugerð fyri virkið hjá samstarvsráðnum.
Til endaliga reglugerð fyri virkið hjá samstarvsráðnum er samtykt, verður henda regla galdandi í sambandi við uppsøgn:
Yrkisfelagið skal hava boð um uppsøgnina við nágreiniligari grundgeving, og verður uppsøgnin ikki givin, fyrr enn yrkisfelagið innan 2 vikur hevur ummælt uppsøgnina.
Landsstýrið ásannar, at yrkisfelagið hevur samráðingarrættin viðvíkjandi øllum fakligum viðurskiftum hjá limunum

### § 25. Samráðingar og seming

Er sáttmálin uppsagdur, og partarnir ikki koma ásamt, ella annar parturin ber seg undan samráðingum, binda partarnir seg til at fáa samráðingar framdar við uppílegging av semingsstovninum.

### § 26. Tulking av sáttmálanum.

Stingur ósemja seg upp partanna millum, um hvussu sáttmálin er at skilja, skulu partarnir í fyrstu atløgu royna at greiða ósemjuna við beinleiðis samráðingum. Enda hesar samráðingar uttan semju, skal ósemjan leggjast fyri ein gerðarætt, sum hevur 5 limir. Hvør av pørtunum tilnevnir 2 gerðarættarlimir, og teir 4 gerðarrættarlimirnir skulu áðrenn málsviðgerðina tilnevna ein 5. gerðarrættarlim, sum verður formaður. Semjast teir 4 gerðarrættarlimirnir ikki um 5. limin, verður hesin tilnevndur av Sorinskrivaranum.

*Stk. 2.* Tá ið annar parturin hevur valt sínar gerðarrættarlimir, og hin parturin í seinasta lagi 8 dagar eftir kunnleikan til valið ikki hevur valt sínar gerðarrættarlimir, hevur fyrr nevndi parturin rætt til at tilnevna gerðarrættarlimir fyri hin, og úrskurðurin hjá gerðarrættinum er hóast hetta bindandi fyri báðar partar.

*Stk. 3.* Gerðarrætturin tekur sjálvur avgerð um mannagongdina fyri máls-viðgerðina og tekur støðu til í sínum úrskurði, hvør skal gjalda sakarkostnað, metingarkostnað o.a.

*Stk. 4.* Gerðarrætturin hevur skyldu til, í seinasta lagi 8 dagar eftir málsvið-gerðina, at siga sín úrskurð.

*Stk. 5.* Úrskurðurin av gerðarrættarmáli er endaligur, soleiðis at skilja, at málið ikki kann leggjast fyri dómstólarnar.

### § 27. Gildi sáttmálans

*Stk. 1.* Hesin sáttmáli hevur gildi frá 1. apríl 2008 at rokna. Sáttmálin kann uppsigast av báðum pørtum við 3 mánaði freist, tó í fyrsta lagi til 1. oktober 2010.

*Stk. 2.* Í sambandi við at siga sáttmálan upp, kann annar parturin krevja, at samráðingarnar byrja innan ein mánað eftir, at krøv eru send mótpartinum. Tó kann parturin í fyrsta lagi krevja at samráðingarnar byrja um at endurnýggja sáttmálan 6 mánaðir áðrenn hann fer úr gildi.

Á Argjum tann 14. mars 2008.

**Fíggjarmálaráðið**
**Føroya Skipara- og Navigatørfelag**

**Nýtt protokollat:**
Partarnir eru samdir um, at Strandfaraskip Landsins ikki kann fremja munandi broytingar í avspákingarskipanini umborð á strandfaraskipum í innanoyggjasigling uttan so, at samráðingar fyrst hava verið millum Strandfaraskip Landsins og Føroya Skipara- og Navigatørfelag.

Undir slíkar broytingar í arbeiðsgongdini, koma eisini skipanir við at ganga vakt umborð á skipum í iannanoyggjasigling, sum Stranafaraskip Landsins tó váttar, at teir ikki í løtuni hava ætlanir um at seta í verk.

**SÁTTMÁLI**

***millum***

***FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ***

***og***

***FØROYA SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAG***

***Um lønir v.m. hjá manningini á***

***<u>”Magnus Heinasyni”</u>***

***1. apríl 2008***

## § 1 Starvssetan og uppsøgn

Hesin sáttmáli fevnir um skiparar og stýrimenn á m/tr. ”Magnus Heinason”, sum ynskja at verða løntir eftir hesum sáttmála.

***Stk. 2.*** Tá ið starv verður lýst leyst, verður hetta lýst í minst einum føroyskum blaði. Lýsast skal, hvat starvið umfatar, og hvørjum lønarflokki starvið verður lønt eftir. Hetta er eisini galdandi, tá ið lýst verður eftir frítíðaravloysarum. Tá ið fólk verða sett í starv, annaðhvørt sum avloysari ella í fast starv, skal hetta verða gjørt aftaná samráðing við viðkomandi skiparar. Fyrstu 6 mánaðir eru royndartíð.

***Stk. 3***. Viðvíkjandi uppsøgn galda reglurnar í starvsmannalógini.

## § 2 Hýra

Skiparar og stýrimenn verða løntir sambært hjáløgdu lønartalvum.

## § 3 Mynstring

Til fiskirannsóknir og praktiskar fiskiroyndir mynstrar manningin hvør sær fyri tað tíðarskeið, hon skal vera við.

***Stk. 2.*** Til fiskiskap verður mynstrað fyri ein túr í senn.

***Stk. 3.*** Fasta lønin og avspákingatíðin verða taldar frá tí degi, mynstrað er, og til skipið fer nýggjan túr, og maðurin ikki er við.

## § 4 Úrtíð o.a.

Manningarnar hava ikki rætt til úrtíðarløn, hvørki gerandisdagar ella sunnu- og halgidagar, tá henda er viðroknað í føstu lønini, frídøgum og fiskiparti. Verður manningin boðsend til arbeiðis í frítíð, t.d. tá skipið er til umvælingar og eftirlit, verður yrkadagar goldin úrtíðarløn 1, ið er 1/2080 av samlaðu árshýruni á 1. stigi í avvarðandi lønarflokki + 30%, og sunnu- og halgidagar úríðarløn 2, ið er 1/2080 av samlaðu árshýruni á 1. stigi í avvarðandi lønarflokki + 40%. Úrtíðarløn 2 verður eisini goldin, tá manningin verður boðsend til arbeiðis í frítíð, og fyri sigling eftir vanligari vaktarskipan undir rannsóknum og praktiskum fiskiroyndum, jólaaftan, nýggjársaftan, páskaaftan, flaggdagin, hvítsunnuaftan, ½ grundlógardag, ½ ólavsøkuaftan, ólavsøkudag, 1. og 2. páskadag, 1. og 2. hvítusunnudag, 1. og 2. jóladag og nýggjársdag.

Einaferð um árið verður arbeiðsdagatalið talt saman og tilsvarandi frídagatal. Verður avlop, verður úrtíðarløn 1 goldin fyri 5/7 av avlopinum og úrtíðarløn 2 fyri 2/7 av avlopinum. Írestandi arbeiðstíð undir uppiløgu verður roknað sum avspasering forút, tó ikki um skipið liggur vegna veður ella brek, og arbeitt verður umborð.

## § 5 Skipanartreytir

Tá skipið er til vanligan fiskiskap, verður manningin avroknað eftir galdandi sáttmála millum Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Føroya Reiðarafelag.

***Stk. 2.*** Tá skipið er til fiskiroyndir fær manningin fasta løn fyri hvønn dag, roknað sum 1/360 av fylgjandi árslønum, jbr. hjáløgdu lønartalvu:

Skipari verður løntur í lønarflokki 3

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Yvirstýrimaður | - | - | - | 2 |
| 1. stýrimaður | - | - | - | 1 |

__
Umframt eigur manningin 15% av landingarvirðinum.

Peningurin verður býttur eftir galdandi sáttmála millum Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Føroya Reiðarafelag um ísfiskaveiðu.

Fyri hvørjar 2 dagar umborð verður veittur 1 1/4 frídagur í landi.

Um skipið á vegi til ella frá fiskiroyndum ger rannsóknir, eiga skipari/stýrimaður løn og frídagar sum til fiskirannsóknir.

Ásetingarnar í § 5, stk. 2, føra ikki til, at Magnus Heinason verður fevndur av møguligum verkfalli millum Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Føroya Reiðarafelag.

***Stk. 3.*** Tá skipið er til fiskirannsóknir, fær manningin fasta løn fyri hvønn dag, roknað sum 1/360 av fylgjandi árslønum:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Skipari | sambært | 3. lønarflokki | |
| Yvirstýrimaður | - | 2. | - |
| 1. stýrimaður | - | 1. | - |

Fyri ein dag umborð, verður veittur ein dagur í landi.

***Stk. 4.*** Skiparar og stýrimenn eiga frítt uppihald, um teir ikki kunnu búgva umborð, tá ið skipið er heimanífrá, og tá ið ikki ber til hjá manningini at búgva heima, meðan arbeitt verður umborð. Kann ikki matskaffast umborð, verður veittur dag- og tímapeningur. Ber ikki til at sova umborð, verður veitt náttarviðbót. Dag- og tímapeningur og náttarviðbót verða sum fyri tænastuferðir hjá tænastumonnum landsins.

## § 6 Eftirløn

Eftirløn:

- 1. oktober 2008 hækkar eftirlønin úr 5 % upp í 6 %.
- 1. oktober 2009 hækkar eftirlønin úr 6% upp í 7 %.

Stk. 2. Partarnir gera serstaka semju um felags (kollektiva) eftirlønarskipan.

## § 7 Lønar- og tænastualdur

***Stk. 1***. Tá fólk verða sett í starv við skipum landsins ella fara úr starvi, skulu tey fáa váttan um lønar- og tænastualdur. Sama er galdandi fyri avloysarar.

***Stk. 2.*** Hava fólk vunnið sær lønar- og tænastualdur við skipum landsins, skulu tey verða lønt eftir hesum.

Avgerð um lønarflokk og -stig verður at taka aftaná samráðing millum avvarðandi stovn/fíggjarmálastýrið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag.

***Stk. 3.*** Manningarnar við skipum landsins skulu mynstra sambært ta til eina og hvørja tíð galdandi løgtingslóg um manning av skipum.

***Stk. 4***. Verður skipari ella stýrimaður í landsins tænastu fluttur í hægri starv innan skipum landsins, kemur hann á tað stig í nýggja lønarflokkinum, sum liggur næst omanfyri ta løn, hann hevði

frammanundan, og fær næstu aldursviðbót frá sama mundi sum frammanundan uttan so, at framflytingin viðførdi, at lønarhækkingin svarar til meira enn eitt lønarstig. Tá ið so er, fær hann nýggja aldursviðbót eitt ár aftaná framflytingina.

### § 8 Fyribils tænasta í hægri starvi

Skiparar og stýrimenn, sum eftir serligum boðum ella eftir frammanundan fastløgdum arbeiðslagi røkja hægri størv í minst eini vakt,sambært § 3, eiga í hesum tíðarskeiði at verða løntir við somu løn, sum teir høvdu fingið, um teir vóru settir í starvið, treytað av, at teir yvirtaka tær arbeiðsuppgávur, ið standast av hægra starvinum.

### § 9 Fyribilshjálp v.m.

Frítíðar- og fyribilsavloysarar verða løntir í tí til starvið hoyrandi lønarflokki sambært egnan lønar- og tænastualdur, vunnin við skipum landsins. Sama er galdandi fyri frítíðaravloysarar.

### § 10 Sjúka, frítíðarløn og eftirsitiløn

Viðvíkjandi sjúku, frítíð og eftirsitiløn galda reglurnar í starvsmannalógini og frítíðarlógini, tó soleiðis, at eftirsitiløn verður veitt í mun til uppsagnartíðina hjá viðkomandi, minst 3 mánaðir og í mesta lagi 6 mánaðir. Eftirsitiløn er tann lønin, viðkomandi hevði. Lønin í mánaðinum, tá skipari ella stýrimaður doyr, verður ikki roknað upp í eftirsitilønina.

***Stk. 2.*** Sjúkradagar í frítíð verða vanliga roknaðir sum frídagar. Tó kunnu eftir umsókn í serligum føri, har sjúkan forðar fyri nýtslu av frítíðini á rímiligan hátt, slíkir sjúkradagar koma undir reglurnar fyri sjúku, og verða nýggir frídagar tá givnir. Um arbeiðsfólkið er óarbeiðsført, tá frítíðin byrjar, verða altíð latnir eyka frídagar. Somu reglur eru galdandi í sambandi við sjúku undir frígongu.

***Stk. 3.*** Skipari/stýrimaður kann fáa frí við løn, tá barn/børn hansara eru sjúk, tó hægst 2 dagar hvørja ferð og í mesta lagi 10 dagar árliga. Hava teir meira enn 2 børn undir 10 ár, kunnu teir fáa frí upp til 20 dagar.

### § 11 Barnsferð

***Starvsfólk, ið er við barn, eigur at siga stovninum frá í minsta lagi 3 mánaðir, áðrenn hon væntar at eiga.***

***Stk. 2. Starvsfólkið verður veitt full løn fyri tíðina, frá tí hon verður óarbeiðsfør, tó í mesta lagi í 8 vikur áðrenn hon væntar sær at eiga og tilsamans í 24 vikur. Afturat hesum kann hon fáa frí við ongari løn og við ongum missi í starvsaldri í 5 mánaðir.***

***Stk. 3. Umframt vendu sømdir í stk. 2, kann starvsfólk fáa upp í 6 mánaða sjúkafrí, tá ið hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur og/ella hana sjálva stends ampi av at vera í starvinum. Í slíkum umstøðum verður veitt henni full løn. Í serligum umstøðum kann setanarmyndugleikin gera av, at veita meiri enn 6 mánaða sjúkraløn.***

***Stk. 4. Ættleiðir starvsfólk barn, fær hon eftir umsókn tænastufrí upp í 24 vikur við løn.***

***Stk. 5. Starvsfólk, ið verður pápi, kann eftir umsókn fáa frí í ein mánað við ongari løn. Soleiðis er eisini, ættleiðir hann barn.***

## § 12 Kostpeningur

Manningarnar eiga rætt til frían kost umborð í arbeiðstíðini.

## § 13 Samráðingar og seming

Um skipari/stýrimaður er valdur í nevnd felagsins, skal honum verða givin heimild at fremja felagsarbeiði í vanligu arbeiðstíðini í ávísum førum, t.d. undir sáttmálasliti, sáttmálasamráðingum og arbeiðsósemjum. Semja skal tó í hvørjum einstøkum føri vera millum fíggjarmálastýrið og felagið um tørvin á slíkum arbeiði. Formaðurin í felagnum ella fíggjarmálastýrið ger stovnin varan við hesi viðurskifti í hvørjum einstøkum føri.

***Stk. 2.*** Er sáttmálin uppsagdur, og semja ikki kemur í lag partanna millum, ella annar parturin ber seg undan tingingum, hevur hvør av pørtunum rætt til at fáa tingingarnar framdar við uppílegging av semingsmanni. Semingsmaðurin verður uppnevndur av pørtunum í felag. Fæst ikki semja um val av semingsmanni, verður hann uppnevndur av sorinskrivaranum. Undir semingsroyndum binda partarnir seg til at ganga undir reglurnar í lóg nr. 86 frá 31. mars 1928 “om mægling í arbejdsstridigheder” við broytingum §§ 3 til 6.

## § 14 Farloyvi

Skipara og stýrimanni kann verða givið farloyvi uttan løn, har tað ikki stríðir móti stovnsins áhugamálum. Farloyvi kann verða givin upp til 2 ár hvørja ferð, tó í mesta lagi 4 ár í senn, og hevur viðkomandi stovnur skyldu til at hava starv til viðkomandi, tá farloyvið er endað.

***Stk. 2.*** Skiparar og stýrimenn, ið hava starvast longur enn 5 ár, skulu so vítt gjørligt hava rætt til 1 árs tænastufrí.
***Stk. 3.*** Um so er, at skipari ella stýrimaður fær farloyvi í sambandi við útbúgving, ið tænir áhugamálum stovnsins, skulu partarnir koma ásamt um farloyvi við løn ella niðursettari løn.

## § 15 Skeiðvirksemi

Tá skeiðvirksemi fer fram eftir ynski stovnsins, skal avvarðandi stovnur útvega luttakarunum prógv fyri tað, skeiðið hevur umfatað. Fyri luttakarar, sum búgva í øðrum kommunum enn henni, skeiðvirksemið er lagt, og í minsta lagi 4 km. frá skeiðstaðnum, eru reglurnar í § 16 galdandi.

Skiparar og stýrimenn, ið starvast á Magnus Heinasyni, hava skyldu at luttaka á teimum skeiðum, ið fyriskrivað verða av Fiskirannsóknarstovuni. Á slíkum skeiðum rindar Fiskirannsóknarstovan luttakarunum løn eftir tí tímatali, ið svarar til ein normaldag í tí siglingarskipan, ið viðkomandi siglir undir.

Verður skeiðið hildið í frítíðini hjá skeiðluttakaranum, eigur viðkomandi yvirtíð sambært § 4, við tí tímatali, ið svarar til ein normaldag, í tí siglingarskipan, sum viðkomandi siglir eftir.

Um skipari/stýrimaður sjálvur í frítíðini ynskir at luttaka á skeiði, sum ikki er kravt til starvið, verður hetta ikki roknað sum arbeiðstíð. Tó kann í hvørjum einstøkum føri gerast avtala við Fiskirannsóknarstovuna, at skipari/stýrimaður fer á skeið, har stovnurin rindar skeiðkostnaðin, kost og innivist sambært § 16 í sáttmálanum.

## § 16 Tænastuferðir

Dag- og tímapeningur undir tænastuferð og endurgjald fyri nýtslu av egnum bili í tænastuørindum verða sum fyri tænastumenn landsins.

## § 17 Arbeiðsklæði

Arbeiðsgevarin letur manningini frí arbeiðsklæði eftir reglum, sum Fiskirannsóknarstovan og Føroya Skipara- og Navigatørfelag avtala. Avtalan skal góðkennast av fíggjarmálastýrinum.

## § 18 Tulking av sáttmálanum

Stingur ósemja seg upp partanna millum um, hvussu sáttmálin er at skilja, skulu partarnir í fyrstu atløgu royna at greiða ósemjuna við beinleiðis samráðingum. Enda hesar samráðingar uttan semju, skal ósemjan leggjast fyri ein gerðarrætt, sum hevur 5 limir. Hvør av pørtunum tilnevnir 2 gerðarrættarlimir, og teir 4 gerðarrættarlimirnir skulu áðrenn málsviðgerðina tilnevna ein 5. gerðarrættarlim, sum verður formaður. Semjast teir 4 gerðarrættarlimirnir ikki um 5. limin, verður hann tilnevndur av sorinskrivaranum.

***Stk. 2.*** Tá ið annar parturin hevur valt sínar gerðarrættarlimir, og hin parturin í seinasta lagi 8 dagar eftir kunnleikan til valið ikki hevur valt sínar gerðarrættarlimir, hevur fyrrnevndi parturin rætt til at tilnevna gerðarrættarlimir fyri hin. Úrskurðurin hjá gerðarrættinum er hóast hetta bindandi fyri báðar partar.

***Stk. 3.*** Gerðarrætturin tekur sjálvur avgerð um mannagongdina fyri málsviðgerðini og tekur í sínum úrskurði støðu til, hvør skal gjalda sakarkostnað, metingarkostnað, o.a.m.

***Stk. 4***. Gerðarrætturin hevur skyldu til, í seinasta lagi 8 dagar eftir málsviðgerðina at siga sín úrskurð.

***Stk. 5.*** Úrskurðurin í gerðarrættarmálum er endaligur soleiðis at skilja, at málið ikki kann leggjast fyri dómstólarnar.

## § 19 Trygdargrunnur

Føroya Skipara- og Navigatørfelag boðar fíggjarmálastýrinum frá, um partar av lønini skulu fara í trygdargrunn ella ikki. Eisini verður sagt frá, hvussu stórur parturin sum prosent av lønini skal vera.

## § 20 Førleikamenning

Partarnir eru samdir um, at strategisk og skipað førleikamenning skal fremjast í verki. Sí fylgiskjal til sáttmálan.

## § 21 Eldrapolitikkur

Partarnir eru samdir um, at í Avtaluni um tiltøk, ið kunnu stuðla undir ein virknan starvsfólkapolitikk á landsins stovnum, verður eitt nýtt stykki sett undir pkt. 3, sum er soljóðandi:
Niðursett tíð orsaka av sparingum
Gera sparingar, at starvsfólk verður sett niður í tíð, varðveitir starvsfólkið eftirlønargjaldið, sum um starvstíðin varð ikki sett niður. Treytirnar eru:

a. Starvsfólkið hevur fylt 55 ár.
b. Starvsfólkið hevur starvast hjá landinum seinastu 10 árini.
c. Arbeiðstíðin er minst ½ tíð, eftir at hon er niðursett.

## § 22 Gildi sáttmálans

Hesin sáttmáli hevur gildi frá 1. apríl 2008 at rokna. Sáttmálin kann uppsigast av báðum pørtum við 3 mánaði freist, tó í fyrsta lagi til 1. oktober 2010.

Á Argjum tann 14. mars 2008.

Føroya Skipara- og Navigatørfelag

Fíggjarmálaráðið

Protokollat

**Avtala um tiltøk at styrkja førleikamenning, eldrapolitikk, familjupolitikk og javnstøðu.**

**Tað er týðandi, at starvsfólkið hevur møguleika fyripersónligari menning, og neyðugt er samstundis at taka atlit til sambandið millum arbeiðslív og onnur lívsviðurskifti. Partarnir eru tí samdir um, at styrkja teir møguleikar, ið stovnarnir hava, tá teir evna sín starvsfólkapolitikk á hesum økjum:**

- **Førleikamenning**
- **Tiltøk, sum kunna stuðla undir eldrapolitikk á landsins stovn um**
- **Tiltøk, sum kunna stuðla undir familjupolitikk á landsins stovnum**
- **Javnstøða**

**Víst verður til hjáløgdu avtalu um tiltøk, ið kunnu stuðla undir ein virknan starvsfólkapolitikk á landsins stovnum.**

**Tórshavn, tann 14. mai 2002.**

**Føroya Skipara- og Navigatørfelag**

**Fíggjarmálastýrið**

**Protokollat**

Partarnir vilja í sáttmálaskeiðnum hyggja nærri at, um tað ber til at gera sáttmála, har miðað verður eftir:

- Betri skipaðum og greiðari viðurskiftum.
- Einfaldari og liðiligari sáttmála.

Tórshavn, tann 14. september 1999

FÍGGJARMÁLASTÝRIÐ

FØROYA SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAG

**Avtala**

millum

Føroya Landsstýri og Føroya Skipara- og Navigatørfelag um tilkallivaktarskipan fyri manningina á vaktarskipum.

§ 1. Um skipari ella stýrimaður tekur við tilkallivakt, so skal hesin fáa hetta samsýnt eftir somu reglum, sum eru galdandi fyri tilkallivakt á strandfaraskipum.

Tórshavn, tann 14. november 1989

FØROYA LANDSSTÝRI

FØROYA SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAG

**Protokollat**

**1.**

Á øllum almennum stovnum verður sett á stovn eitt samstarvsráð, har umboð fyri leiðslu, álitisfólk og varaálitisfólk sita.

Samstarvsráðið skal hava innlit í øll mál stovninum viðvíkjandi, og verða avgerðir ikki tiknar, fyrrenn samstarvsráðið hevur gjørt sítt tilmæli.

Settur verður fýramanna bólkur við tveimum umboðum, valdum av yrkisfeløgunum, og tveimum, valdum av landsstýrinum, at gera uppskot til reglugerð fyri virki samstarvsráðsins.

Til endaliga reglugerðin fyri virkið hjá samstarvsráðnum er samtykt, verður henda regla galdandi í sambandi við uppsøgn:

Yrkisfelagið skal hava boð um uppsøgnina við nágreiniligari grundgeving, og verður uppsøgnin ikki givin, fyrr enn yrkisfelagið innan eina viku hevur ummælt uppsøgnina.

**2.**

Fíggjarmálastýrið ásannar, at yrkisfeløgini hava samráðingarrættin viðvíkjandi øllum fakligum viðurskiftum hjá limunum.

Tórshavn, tann 4. januar 1994

FØROYA LANDSSTÝRI
FØROYA SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAG

# Føroya Skipara- og Navigatørfelag
# Magnus Heinason

## Lønartalva tann 1. oktober í 2008

| Lønarflokkar | | | Stig | Mánaðarløn | Ársløn | Eftirlønargjald 6% |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **-1** | | | | | | |
| 1 | | | 1 | 25.865,55 | 310.386,57 | 1.551,93 |
| 2 | | | 2 | 26.122,71 | 313.472,57 | 1.567,36 |
| 3 | **-2** | | 3 | 26.379,88 | 316.558,57 | 1.582,79 |
| 4 | 1 | | 4 | 26.637,05 | 319.644,57 | 1.598,22 |
| 5 | 2 | | 5 | 26.894,21 | 322.730,57 | 1.613,65 |
| 6 | 3 | | 6 | 27.151,38 | 325.816,57 | 1.629,08 |
| 7 | 4 | | 7 | 27.408,55 | 328.902,57 | 1.644,51 |
| 8 | 5 | | 8 | 27.665,71 | 331.988,57 | 1.659,94 |
| 9 | 6 | | 9 | 27.922,88 | 335.074,57 | 1.675,37 |
| | 7 | | 10 | 28.180,05 | 338.160,57 | 1.690,80 |
| | 8 | | 11 | 28.437,21 | 341.246,57 | 1.706,23 |
| | | **-3** | 12 | 28.694,38 | 344.332,57 | 1.721,66 |
| | | 1 | 13 | 28.951,55 | 347.418,56 | 1.737,09 |
| | | 2 | 14 | 29.208,71 | 350.504,56 | 1.752,52 |
| | | 3 | 15 | 29.465,88 | 353.590,56 | 1.767,95 |
| | | 4 | 16 | 29.723,05 | 356.676,56 | 1.783,38 |
| | | 5 | 17 | 29.980,21 | 359.762,56 | 1.798,81 |
| | | 6 | 18 | 30.237,38 | 362.848,56 | 1.814,24 |
| | | 7 | 19 | 30.494,55 | 365.934,56 | 1.829,67 |
| | | 8 | 20 | 30.751,71 | 369.020,56 | 1.845,10 |

| | |
|---|---|
| Vaktargjald 1: | 21,3 |
| Vaktargjald 2: | 42,59 |

# Føroya Skipara- og Navigatørfelag
# Magnus Heinason
# Lønartalva tann 1. oktober í 2009

| Lønarfl. | | | Stig | Mánaðarløn | Ársløn | Eftirlønargj. 7% |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **-1** | | | | | | |
| 1 | | | 1 | 26.434,59 | 317.215,08 | 1.850,42 |
| 2 | | | 2 | 26.697,41 | 320.368,97 | 1.868,82 |
| 3 | **-2** | | 3 | 26.960,24 | 323.522,86 | 1.887,22 |
| 4 | 1 | | 4 | 27.223,06 | 326.676,75 | 1.905,61 |
| 5 | 2 | | 5 | 27.485,89 | 329.830,64 | 1.924,01 |
| 6 | 3 | | 6 | 27.748,71 | 332.984,53 | 1.942,41 |
| 7 | 4 | | 7 | 28.011,54 | 336.138,42 | 1.960,81 |
| 8 | 5 | | 8 | 28.274,36 | 339.292,32 | 1.979,21 |
| 9 | 6 | | 9 | 28.537,18 | 342.446,21 | 1.997,60 |
| | 7 | | 10 | 28.800,01 | 345.600,10 | 2.016,00 |
| | 8 | | 11 | 29.062,83 | 348.753,99 | 2.034,40 |
| | | **-3** | 12 | 29.325,66 | 351.907,88 | 2.052,80 |
| | | 1 | 13 | 29.588,48 | 355.061,77 | 2.071,19 |
| | | 2 | 14 | 29.851,31 | 358.215,66 | 2.089,59 |
| | | 3 | 15 | 30.114,13 | 361.369,56 | 2.107,99 |
| | | 4 | 16 | 30.376,95 | 364.523,45 | 2.126,39 |
| | | 5 | 17 | 30.639,78 | 367.677,34 | 2.144,78 |
| | | 6 | 18 | 30.902,60 | 370.831,23 | 2.163,18 |
| | | 7 | 19 | 31.165,43 | 373.985,12 | 2.181,58 |
| | | 8 | 20 | 31.428,25 | 377.139,01 | 2.199,98 |

| | |
|---|---|
| Vaktargjald 1: | 21,76 |
| Vaktargjald 2: | 43,53 |